Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*6. oktober 2022*

# UMMÆLISSKRIV

***viðvíkjandi***

**Uppskoti til kunngerð um løgtingslóg um broyting broyting í kunngerð um ALS-gjald**
(Lækking av ALS-gjaldinum)

Í uppskotinum verður ALS-gjaldið lækkað úr núverandi 1% og niður í 0,8%. Tað verður ikki sagt beinleiðis, men um ein lesur viðmerkingarnar í lógaruppskotinum um broytingar í Barsilskipanini, so tykist sum um, at ein orsøk til lækkingina er at leggja upp fyri, at Barsilsgjaldið hækkar.

Tað er ikki longur síðan enn 1 januar 2021, at ALS-gjaldið seinast lækkaði. Tá lækkaði gjaldið úr 1,25% og niður í núverandi 1%. Heldur ikki tá varð tað sagt beinleiðis, men ein orsøk sá út til at verða tann, at heilsutrygdargjaldið hækkaði.

Lógin er soleiðis, at gjaldið kann ásetast við kunngerð, um bara gjaldið ikki fer upp um 2,25%. Sambært allari vanligari búskaparligari og løgfrøðiligari hugsan, so er ALS-gjaldið at meta sum ein skattur, og skattur eigur – bæði sambært stýrisskipanarlóg og góðari siðvenju – at verða ásettur við løgtingslóg. Verður hugt at øllum hinum sosialu gjøldunum, so verður gjaldið ásett beinleiðis í lógini.

BLF vil tí mæla til, at kunngerðarbroytingin verður tikin aftur, og at ALS-gjaldið frameftir verður ásett í ALS-lógini. Soleiðis ber eisini til at tryggja, at broytingar í ALS-gjaldinum frameftir fáa eina hóskandi viðgerð. Har eru uttan iva góðar grundir til at lækka gjaldið. Men gjaldið má viðgerast sjálvstøðugt, og ikki bara broytast, tí onnur gjøld verða broytt.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**